## Máltindurin

adidas

### Formula-deildin

| | | |
|---|---|---|
| Bogi Gregersen | Skála | 11 |
| Hans á Lag | HB | 10 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 10 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 10 |
| Súni Olsen | GÍ | 9 |
| Allan Mørkøre | B36 | 8 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 8 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 8 |
| Dan Djurhuus | VB | 8 |
| Sorin Anghel | EB/S | 7 |
| Rúni Nolsøe | HB | 7 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 7 |
| Obele Okeke Onyebuchi | B36 | 6 |
| Sámal Joensen | GÍ | 6 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 6 |
| Hanus Thorleifsson | Skála | 6 |
| Sonni L. Petersen | EB/S | 5 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 5 |
| Atli Danielsen | KÍ | 5 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 5 |
| Óli Johannesen | TB | 5 |
| Milan Kulic | VB | 5 |

### 2. deild

| | | |
|---|---|---|
| Clayton Soares | B71 | 16 |
| Súni Fríði Barbá | AB | 14 |
| Jóhan Petur Poulsen | B68 | 12 |
| Uni Arge | HB | 10 |
| Hendrik Rubeksen | HB | 8 |
| Ovi Magnussen | B68 | 7 |
| Magnus Olsen | B71 | 7 |
| Sonny Johansen | FSV04 | 7 |
| Magnus Skorðalíð | LÍF | 7 |
| Kim Poulsen | FSV04 | 6 |
| Tummas Hans Rubeksen | B36 | 5 |
| Eli Hentze | B71 | 5 |
| Tummas Pauli Olsen | B71 | 5 |
| Fróði Joensen | LÍF | 5 |
| Arnbjørn Danielsen | B68 | 4 |
| Øssur Jacobsen | B68 | 4 |
| Símun Hansen | B71 | 4 |
| Birgir Joensen | FSV04 | 4 |
| Petur Sjúrðaberg | LÍF | 4 |
| Jakob Skaaning | Sumba | 4 |
| Jóan Pauli Olsen | Sumba | 4 |
| Rene Thomsen | Sumba | 4 |

### Formula-deildin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skála | 20 | 11 -7 - 2 | 46 | 22 | 24 | 40 |
| 2 | HB | 20 | 12 -3 - 5 | 55 | 24 | 31 | 39 |
| 3 | B36 | 20 | 10 -7 - 3 | 28 | 12 | 16 | 37 |
| 4 | NSÍ | 20 | 10 -6 - 4 | 31 | 23 | 8 | 36 |
| 5 | EB/ Streymur | 20 | 7 -9 - 4 | 29 | 28 | 1 | 30 |
| 6 | GÍ | 20 | 6 -4 -10 | 27 | 35 | -8 | 22 |
| 7 | ÍF | 20 | 5 -5 -10 | 23 | 46 | -23 | 20 |
| 8 | VB | 20 | 5 -4 -11 | 26 | 42 | -16 | 19 |
| 9 | KÍ | 20 | 5 -2 -13 | 27 | 40 | -13 | 17 |
| 10 | TB | 20 | 3 -5 -12 | 17 | 37 | -20 | 14 |

### 2. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 11 | 10 -0 - 1 | 42 | 9 | 33 | 30 |
| 2 | B71 | 11 | 9 -1 - 1 | 39 | 7 | 32 | 28 |
| 3 | FSV04 | 11 | 7 -1 - 3 | 27 | 10 | 17 | 22 |
| 4 | AB | 11 | 6 -2 - 3 | 25 | 22 | 3 | 20 |
| 5 | HB | 11 | 6 -1 - 4 | 32 | 22 | 10 | 19 |
| 6 | LÍF | 11 | 4 -1 - 6 | 34 | 26 | 8 | 13 |
| 7 | Sumba | 11 | 3 -1 - 7 | 24 | 40 | -16 | 10 |
| 8 | Royn | 11 | 3 -0 - 8 | 12 | 43 | -31 | 9 |
| 9 | B36 | 11 | 2 -2 - 7 | 11 | 28 | -17 | 8 |
| 10 | GÍ | 11 | 0 -1 -10 | 12 | 51 | -39 | 1 |

# Anderson helt B68 á tindunum

**Eftir tógvið stríð er Anderson nú aftur at síggja í B68-álopinum. Leygardagin kvittaði hann fyri álitið, tá hann skeyt øll málini í 3-1 sigrinum á HB**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Talan var um truplan útidyst hjá B68, tá teir um vikuskiftið vitjaðu hjá HB. Hóast HB er nýtt lið í deildini, so hava ungu menninir saman við nøkrum veteranum veruliga gjørt um seg í deildini, og málsetningurin um at halda liðnum í deildini, er í øllum førum rokkin væl og virðiliga.

Toftamenn høvdu tó ein eyka trumf við í viðførinum hesaferð. Nógv hevur verið tosað og skrivað um brasilianska Anderson, sum einar tvær ferðir hevur verið ávegis til Føroyar, men ymiskt óavgreidd viðurskifti við eitt belgiskt felag hava tó seinkað hesum óneyðuga nógv.

Leygardagin var hann tó at síggja í B68-álopinum, og hann kvittaði so ruddiliga fyri tolið, sum toftamenn hava sýnt honum. Hann var nevnliga meistari fyri øllum trimum toftamálunum í einum dysti, har gestirnir kanska áttu sigurin uppibornan, men har HB so sanniliga stríddist fyri sínum møguleika.

### B71 hongur í

Argastu kappingarneytarnir hjá B68, B71, vóru á vitjan í Leirvík, og eisini her var tað ein brasiliumaður, sum var munurin.

Clayton Soares var eftir góðum korteri tann einasti, sum sá møguleikan, tá bóltarin varð sparkaður langt og høgt inn um LÍF-verjuna, og so meddaði hann í málið við kølna vinstrabeininum.

Eftir hetta royndu vertirnir at trýsta fyri javnleikinum. Teir høvdu eisini einstakar møguleikar, og ikki minst mundu sandoyingar draga andan lættari, tá ein púra blankur Sølvi Vatnhamar stútaði framvið.

Sandoyingar høvdu tó eisini sínar møguleikar. Fleiri ferðir kontraðu teir niðan eftir vøllinum, men talan gjørdist altso bara um tað eina málið í dystinum.

### Vágamenn mistu

Saman við B71 og B68 hevur FS Vágar eisini verið partur av oddastríðnum í ár, men tann leikluturin er nú fyribils av.

Á Argjum eydnaðist sjáldan hjá gestunum at spæla seg fram til veruligar málmøguleikar, men hóast AB soleiðis var nærri sigrinum, so tóktist talan skula gerast um málleysan javnleik.

Góðan hálvan tíma fyri dystarlok tók Jón Brekku tó um endan. Við einum dundurskoti úr einum at kalla vandaleysum vinkli, sendi hann leðurkúluna í meskarnar, og so kundu argjamenn fegnast um, at teir enn hava í øllum førum bronsuna at spæla fyri.

### GÍ er púra avbyrgt

Í botninum hevur GÍ havt tað sera trupult í ár, og sum talvan nú sær út, so er lítið at ivast í, at beinleiðis niðurflytingin verður veruleiki.

Hesa ferð spældu teir á heimavølli móti Sumba, sum undan dystinum var triðniðast, men heldur ikki hesaferð megnaði GÍ at fáa nakað burturúr.

Tá B36 so samstundis vann ein uppibornan sigur í Hvalba, øktist fjarstøðan hjá GÍ til bjarginina. Teir hava enn bara eitt stig, meðan B36 við sigrinum kom upp á 8 stig.

### Úrslitini:

**HB-B68 1-3**
0-1: Anderson
1-1: John Eystberg
1-2: Anderson
1-3: Anderson

**LÍF-B71 0-1 (0-1)**
0-1: Clayton Soares

**AB-FSV2004 1-0 (0-0)**
1-0: Jón Brekku

**Royn-B36 0-1 (0-0)**
0-1: Heini í Skorini

**GÍ-Sumba 1-3 (1-2)**
1-0: Poul Henning Jacobsen
1-1: Kenneth Kjærbo
1-2: Jakob Skaaning
1-3: Jakob Skaaning

# Renna niðan á Sornfelli

**Mjørkadals Ítróttarfelag (MÍF) skipar fyri motiónsrenningini MIF TOP RUN 27. august 2005, kl. 15.00. Øll eru vælkomin at luttaka, tó skal man vera varugur við at túrurin so at siga er móti brekku allan vegin!**

RENNING
*tíðindaskriv*




*Næsta vikuskifti verður aftur skipað MIF-top run*

MIF TOP RUN varð runnið fyrstu ferð 6. september 2003, og hóast Føroyar spældu landsdyst móti Skotlandi júst um somu tíð, vóru 35 luttakarar fúsir at renna, og allir komu teir á mál. Seinasta ár var MIF TOP RUN 4. september, og hendan dagin var veðrið alt annað enn til vildar - regn, mótvinur og mjørki - illfýsna veðrið var tó ongin forðan og møttu meira enn 50 rennarar, og eisini hesaferð megnaðu allir rutuna og komu á mál.

Vinnarin í 2004 hjá monnunum var Hallur Holm, sum rann strekkið uppá 46m 56s, og hjá kvinnunum vann Petra Hansen við tíðini 1t 01m 44s.

Mótsett flestu motiónsrenningum, har man leggur teinin so slætt sum møguligt, er MIF TOP RUN ein eyka avbjóðing, við tað at teinurin er lagdur sum ein "móti brekku-renning". Renningin byrjar vid Statoilstøðina í Kollfjarðardali (75 metrar yvir havinum) og endar á Sornfelli (680 metrar yvir havinum), eitt strekkið uppá 9,8 km.

Renningin verður býtt sundur í fýra bólkar: Menn undir 40 ár, menn yvir 40 ár, kvinnur undir 40 ár og kvinnur yvir 40 ár, trý tey fyrstu í hvørjum bólki fáa heiðursmerki. Teir fýra bólkavinnarirnir fáa eina kontantviðursløn uppá kr. 500,00 frá Føroya Banki. Sum nakað nýtt verður ein eykavinningur á kr. 500,00 latin, um nýtt met verður sett - eisini frá Føroya Banka. Metið fyri menn er 46m 15s, og tað var Sigurð Justinussen, sum setti tað í 2003, og hjá kvinnunum er tað Petra Hansen, sum rann rutuna í 2004 við tíðini 1t 01m 44s.

Harumframt verður lutakast um fleiri vinningur, millum luttakararnar, ið meldaðu seg til og goldu áðrenn 26. august 2005 kl. 20.00, og sum eru komnir á mál. Hetta eru góðir vinningar frá m.a. Hotel Hafnia og Tryggingarfelagið Føroyar.

Meira kann lesast um renningina á www.mif.fo